Erotisku søgurnar fáast nú

Stuttsøgusavnið »Ein varligur dráttur í tara og aðrar stuttsøgur« fæst nú til keyps í bókhandlunum kring landið. Savnið er úrslit av erotisku stuttsøgukappingini sum Meginfelag Føroyskra Studenta skrivaði út á heysti 1994. Myndirnar hevur Jákup Veyhe teknað. »Ein varligur dráttur í tara og aðrar stuttsøgur« er 147 bladsíður og kostar 130 kr.

Ein dómsnevnd varð sett til at meta um søgurnar, sum vóru sendar inn til kappingina. Í henni sótu Ebba Hentze, Rói Patursson, Malan Marnersdóttir, André Niclasen og Oddvør Johansen. Tey avgjørdu at láta fyrstu virðisløn til Sjúrða Skáale fyri søguna »Ein varligur dráttur í tara«. Onnur virðisløn varð latin fyri søguna »Gevið ljóð!!!« og triðja til søguna »Hon koyrdi altið við bussinum«, báðar skrivaðar undir sama dulnevni. Vinnarasøgurnar vóru prentaðar í Fjølni á heysti 1995. Nú eru tær so givnar út í bók saman við 11 av hinum innkomnu søgunum, so savnið ialt fevnir um 14 ymiskar søgur.

Evnið erotikkur gongur aftur í øllum søgunum, sum annars eru sera fjølbroyttar. Frá tí heilt óskyldiga fyrsta kærleikanum í hoyggjhúsinum til tað meira grova í barrmiljønum í Havn. Frá blíðum eygnakøstum til mergjaðar lýsingar av elskhugsleiki. Eitt annað, sum gongur aftur í søgunum, er at umhvørvið er væl lýst. Náttúran og býurin verða hegnisliga brúkt sum karmur um sjálva kjarnuna í søgunum.

Hvussu fjølbroyttar søgurnar eru sæst t.d. við at lesa niðanfyri standandi brot úr savninum.

Brot úr søguni «Ormatos í runudiki»

Tungan hjá henni var skapt til annað enn vokalir og svarabhaktiljóð, og tað fekk eg at føla! Hon gav mær ein langan umgang við o-umljóðum, og s dettur burtur við synkopu, fyri síðan at fara til nominativ præsens, og genitiv singularis. Hon dugdi øll tey 32 finsku kasus'ini, og akkussativ á týskum. Eg var næstan í ferð við at bróta út í eitt óartikulerað onomatopoietikon, tá eg hoyrdi eina alt ov vælkenda rødd í durunum: »Tú, tú, hava tú sæð Klæmint?« s. 22, sp. 1.

»Eg hevði onki fingið í eitt mannaminni! Nú var kjansurin her – og so blivu vit órógvað av tí býttasta danskaranum, sum enn hevur gingið á tveimum beinum á politistøðini í Havn! Og guðsdoy, um ikki imbesilurin bleiv við at jarma á sínum tápuliga hálvbrotna, sum hevði hann akkurát mótt mær ein leygardag seinnapart á Konditarinum, og ikki í politiørindum við bugfullum hondum av bevísmateriali.

»Tú, jeg fylgdes med Klæmint og tey, men så knæplige var tey vekk. Eg halda bestemt, tey renna undan mær. Hava tú sæð tey?«

Eg visti, at mínir kæru arbeiðsfelagar høvdu tað til ítriv at renna undan Betjent Larsen, tá teir ikki orkaðu at hoyra meira uppá hansara brokkari. Men hesaferð høvdu teir komið mær í kløtur.

Nú galt um at finna upp á ráð. Eg mutlaði okkurt um at: Hetta er ikki tað, sum tað sær út til… »Nä«, svaraði hann. »Tú hava gloymt at sløkkja ljósini á politibilen. Tað var tí, eg kom inn«. s. 33, sp. 2.

Brot úr søguni «Gevið ljóð!!!»

»Tú sigur ikki nógv«, tað var hon, sum breyt tøgnina. »Nei…« »Tú hevur ongar frøknur eftir. Hvar eru tær farnar?« Hon hugdi upp á meg. »Skolaðar burtur«, segði eg, og royndi at smílast. Hon smíltist eisini: »Tað var nú synd. Tær vóru so fittar« »T … tú ert eisini fitt«, hoyrdi eg meg stamandi kønka, meðan eg hugdi beint niður á tann skrógvandi høgvin. »Ah, litli Frøknuper«, læi hon argandi og índi mær eftir kjálkanum. s. 20 sp. 1-2.

Brot úr søguni «Argantael»

Klettur er krunkasvartur í summarnáttini, og aldurnar sleikja upp eftir honum so blíðliga sum ein tunga ikki langt undir fótum hennara. Kletturin, hon situr á, er kølin, men ikki kaldur, eitt sindur av toruhitanum er eftir í honum enn. Hon kennir, hvussu harður og ráur hann er gjøgnum kjólan. Hon leggur hondina á klettin og tær um ein smástein. Hon tekur hann, og letur hann liggja í lógvanum, meðan hon kínir eftir honum við tveimum fingrum. Hann er kaldur, men so óvanliga slættur og mjúkur. Hann er rundur og hevur eitt hol í miðjuni, heilt natúrligt, skapt av vatninum, sum hevur rurað hann aftur og fram í kanska hundrað ár. s. 77, sp. 1-2.

Torbjørn Olsen framsýning á ólavsøku

Okkara hátt virdi listamaður Torbjørn Olsen hevur í ár sína egnu forvitnisligu ólavsøkuframsýning. Hon letur upp ólavsøkuaftan beint eftir kappróðurin, og er í List-Gallarínum Friðriksvegi, sum er í teimum fyrrverandi Impo-húsunum í Vágsbotni (Grækaris Hansens pakkhúsi).

Á framsýningini hevur Torbjørn Olsen nógv nýtt.

Ólavsøkudagarnar er opið frá kl. 15 til 18. Framsýningin heldur annars fram til 10. august tær tiðir, List-Gallarríð vanliga er opið (kl. 16–17.30, leygardag tó kl. 10.30–12.00).

Fleiri bólkar um eitt band

„Jacta est alea" nevnist eitt band, sum júst er komið út.

Kápumyndin er orsøkin til, at bandið fekk hetta heitið, ið merkir terningarnir eru kastaðir.

Bólkarnir eru fimm, sum hava kastað saman um at gera felags band. Tað hava teir gjørt, tí tað kostar nógv at geva band út, og tað kann vera líka gott, at hvør bólkur bara fær tvey løg við.

Teir fimm bólkarnir eru Black Panters, Tinganest, Av & Á, A3 og Birgir & Jónsvein.

Av & Á spælir ikki alment, og nýggjasti bólkurin, A3, hevur ongantíð áður verið at hoyrt. Tað eru trý ung úr Hvalvík og Streymnesi, sum manna henda bólkin.

Hinir bólkarnir eru úr Kollafirði, frá Gjógv, úr Vagum og av oyri og frá Norðskála.

Bandið er upptikið í VHR-Studio í Rituvík, og bandfaldað hjá Rema í Saltangará.

BINGO VIÐ NORRÖNU


Á Bergen - ferðini hjá Norrönu mánadagin 29. - 31. juli verður bingo hildið umborð

Nógvir góðir VINNINGAR - m.a. ferð við Norrönu

DANSI-UNDIRHALD UMBORÐ VIÐ SKIPS-ORKESTRI

Farið verður av Havnini mánadagin 29. juli kl. 14.00
Komið verður aftur á Havnina mikudagin 31. juli, kl. 11.00

Kostnað ur úr EINANS kr. 350,-
(Serkostnaður fyri bólkar)



Ring og hoyr meira
- títt ferðasamband við útheimin
TLF. 15900
J. Broncksgøta 37
SMYRIL LINE

SÚKKLUR

* allar støddir
* nógv sløg
& bert tær bestu



FIRMA
JOHN W. THOMSEN
Box 10 · 700 Klaksvík
Tlf. 55858 · Fax 57878

ÓLAVSØKUTILBOÐ

Mazda 929 st. car.
árg. 87, 81.300 km Kr. 16.000,-

Peugot J5. vøruvognur diesel
árg. 87, 163.400 km Kr. 10.000,-

Citroën BX 19 TRS St. car
árg. 86, 189.000 km Kr. 12.000,-

Eisini hava vit brúktar bilar í ymiskum merkjum og árgangum.
Við brúktbilagarantii upp til 6 mánaðar.

Sp/f Ivan Johansen Bilar
Hoyvíksvegur 63 · Box 3205
FR-110 Tórshavn
Tlf. 13666 · Fax 10866

SUMMARFRÍ

Stongt verður frá 26.7.–19.8.

Tannlæknastovan v/ Sólvá Eystberg
Kráargøta 14 · Klaksvík · Tlf. 56555